# Úttøka til landslið

DSF hevur fingið fígging frá ÍSF til at senda landslið við kvinnum og monnum til Nordic Cup, sum verður í Danmark í mai 2020. Á hvørjum liði eru 4 leikarar.

Nevndin í DSF fekk heimild frá aðalfundinum 31.08.19 at gera reglugerð fyri úttøku av landsliðunum.

**Kvinnur**

6 tær ovastu kvinnurnar á styrkilistanum í single eftir kappingina hjá VDF 21.03.2020 koma við í brutto-hópin. DSF skipar síðan fyri tveimum landsliðssamlingum og tekur síðan út endaliga hópin á 4 kvinnur.

**Menn**

6 teir ovastu menninir á styrkilistanum í single eftir kappingina hjá VDF 21.03.2020 og tveir teir bestu spælararnir í liðkappingini koma við í brutto-hópin. Er talan um somu persónar í single- og liðkappingini, koma nr 7 og møguliga nr. 8 við í bruttohópin. DSF skipar síðan fyri tveimum landsliðssamlingum og tekur síðan út endaliga hópin á 4 menn.

**Úttøkukrøv**

Fyri at verða tikin út til bruttohópin skal leikari hava tikið lut í

- minst 3 av 7 kappingardøgum í single
- minst tveimum umførðum í liðkappingini fyri tveir teir bestu í liðkappingini

Leikarar, ið hava fingið revsing ella karantenu frá DSF, verða ikki tiknir við í bruttohópin.

Leikarar, ið ikki møta til landsliðssamlingarnar, verða ikki tiknir út til endaliga hópin.

Eftir landsliðssamlingarnar tekur nevndin í DSF endaligu hóparnar út eftir eini heildarmeting, har dentur verður lagdur á hesi viðurskifti:

Seriøsitet, hugburð og ídni

Stigatalvur

Úrslit í altjóða kappingum

Kemi og virðing fyri hinum í hópinum